# Tilmælið til avgerð viðvíkjandi viðtøkuni av leiðregluni um hóskandi samsýning í útboðs- og tilboðsarbeiði hjá vinnugreinafelagnum Samskifti.

Frá Kappingareftirlitinum

Máls.nr. 24/00453

Dagfesting

Skálatrøð 20 · Boks 73 110 Tórshavn · Tlf.: +298 356040 · Fax: +298 356055 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

**Yvirlit**

1. Samandráttur .......... 2

2. Avgerð hjá Kappingarráðnum .......... 4

3. Málslýsing .......... 5

3.1. Inngangur .......... 5

3.2. Partarnir .......... 8

3.3. Marknaðarlýsing .......... 11

3.4. Hoyringssvar .......... 11

4. Meting .......... 14

4.1. Marknaðarskilmarking .......... 14

4.2. Viðkomandi marknaður .......... 14

4.2.1. Viðkomandi vørumarknaður .......... 15

4.2.2. Viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin .......... 16

4.2.3. Ávegis niðurstøða um viðkomandi marknað .......... 16

4.3. 6§ í kappingarlógini .......... 16

4.3.1. Hugtakið fyritøka í kappingarlógini .......... 17

4.3.2. Avtala, viðtøka ella samskipan .......... 18

4.3.3. Til endamál og /ella til fylgju .......... 19

4.3.3.1 Innihaldi í avtaluni .......... 20

4.3.3.2 Endamálið við avtaluni .......... 20

4.3.3.3 Tann búskaparliga og løgfrøðiligi samanhangurin í avtaluni .......... 21

4.3.3.4 Ávegis niðurstøða um avtalan hevur til endamál og /ella til fylgju .......... 22

4.3.4. Kappingaravlaging sum merkist .......... 22

4.3.5. Ávegis niðurstøða um brot á § 6, stk. 1, í kappingarlógini .......... 23

4.4. Frítøka .......... 23

4.4.1 §7 í kappingarlógini .......... 23

4.4.2. §8 í kappingarlógini .......... 24

5. Samlað niðurstøða .......... 24

6. Tilsøgnin .......... 26

7. Kæruvegleiðing .......... **Error! Bookmark not defined.**

## 1. Samandráttur

1. Málið snýr seg um, at Kappingareftirlitið hevur kannað, um leiðreglan hjá vinnugreinafelagnum, Samskifti, sum varð viðtikin av limafeløgunum í vinnugreinafelagnum, Samskifti, og løgd út á heimasíðu felagsins, var í stríð við § 6, stk. 1, sbrt., § 6, stk. 3, í kappingarlógini, um samskipan av atferð. Vinnugreinafelagið Samskifti hevur síðan veitt eina tilsøgn, sum loysir tey kappingarligu ivamálini, sum Kappingareftirlitið hevði.

2. Vinnugreinafelagið Samskifti er vinnugreinafelagið fyri lýsingarfyritøkur, og virkar felagið fyri teirra yrkisligu, felagsligu og fíggjarligu áhugamálum. Vinnugreinafelagið, Samskifti, hevði í hesum sambandi viðtikið eina leiðreglu um "*ikki at veita kreativt arbeiði ella ráðgevingararbeiði í tilboðsarbeiði, uttan at hóskandi samsýning er við. Ein hóskandi loysn kann eisini vera, at kundar biðja um tilvísingar um líknandi arbeiði, tá biðið verður um tilboð*".

3. Kappingareftirlitið vendi sær til vinnugreinafelagið, Samskifti, tann 6. november 2024 við umbøn um upplýsingar. Biðið var um at fáa gerðabøkur, fundarfrásagnir, samtyktir og viðtøkur seinastu 5 árini.

4. Leiðreglan, sum varð viðtikin, varð viðtikin á aðalfundinum av limafeløgunum í vinnugreinafelagnum Samskifti. Orsøkin til leiðregluna var eitt útboð hjá Tórshavnar kommunu av nýggjari sniðhondbók. Eftir tingingar við Tórshavnar kommunu, valdi Tórshavnar kommuna ikki at bjóða út nýggja sniðhondbók kortini. Vinnugreinafelagið, Samskifti, viðtók stutt eftir hetta leiðregluna fyri at vísa á týdningin á tí kreativa arbeiði sum limafeløgini gera.

5. Kappingareftirlitið metir, at leiðreglan um hóskandi samsýning hevur eitt eyðkenni av einari prísavtalu við óbeinleiðis hóttan um boykott. Hetta er tí at kravið um hóskandi samsýning er eitt krav um samsýning fyri tað útboðs- og tilboðsarbeiðið, sum feløgini annars ikki fáa samsýning fyri. Virknaðurin av einum kravi um hóskandi samsýning er, at feløgini minka um tann fíggjarliga váðan sum er í einum útboðs- og tilboðsarbeiði.

6. Kappingareftirlitið hevur skilmarkað viðkomandi marknað til samskiftistænastur og samskiftisráðgeving í Føroyum. Við tað at Vinnugreinafelagið, Samskifti, hevur veitt Kappingareftirlitinum eina tilsøgn, sum loysir tey kappingarligu ivamálini, ið Kappingareftirlitið hevði, er skilmarkingin av viðkomandi marknaði ikki gjørd endalig.

7. Kappingareftirlitið metir, at vinnugreinafelagið, Samskifti, er fevnt av forboðnum móti kappingaravlagandi avtalum, sbrt. § 6, stk. 1, sbrt. § 6, stk. 3, í kappingarlógini, við sum vinnugreinafelag at samskipa atferðina hjá limunum.

8. Kappingareftirlitið metir, at viðtøkan av leiðregluni sannlíkt er fevnd av forboðnum í § 6, stk. 1, sbrt. § 6, stk. 2, nr. 1, í kappingarlógini, um prísavtalur, við óbeinleiðis hóttan um boykott. Somuleiðis metir Kappingareftirlitið, at avtalan sannlíkt hevur sum endamál at avmarka kappingina, og at avlagingin merkist.

9. Av tí at talan sannlíkt er um eina kappingaravlagandi avtalu, sum hevur til endamáls at avmarka kappingina, er ikki møguligt at undantaka avtaluna eftir § 7 í kappingarlógini. Her skal samstundis vísast á, at limafeløgini hava ein ov stóran marknaðarpart, til at avtalan kann frítakast eftir § 7 í kappingarlógini. Tað er heldur ikki møguligt at undantaka avtaluna eftir § 8 í kappingarlógini, tí

treytirnar fyri undantøku ikki eru loknar, sbrt. § 8, stk. 1, nr. 3, í kappingarlógini. Ásetingarnar í §§ 9-10 í kappingarlógini eru ikki viðkomandi, tí vinnugreinafelagið, Samskifti, hevur ikki biðið um frítøku, sbrt. § 9 í kappingarlógini, og viðkomandi landsstýrismaður hevur ikki ásett treytir fyri frítøku eftir § 10 í kappingarlógini.

10. Vinnugreinafelagið Samskifti hevur veitt eina tilsøgn, sum loysir tey kappingarligu ivamálini, sum Kappingareftirlitið hevur.

11. Tilsøgnin, sum vinnugreinafelagið, Samskifti, bjóðar Kappingareftirlitinum, er fylgjandi:

- Vinnugreinafelagið Samskifti hevur kunnað limirnar um tað møguliga brotið á kappingarlógina,
- Leiðreglan er strikað og verður verðandi strikað,
- Vinnugreinafelagið Samskifti bindur seg til ikki at samskipa atferðina mótvegis triðjamanni, serliga viðvíkjandi prísum og treytum hjá limafeløgunum,
- Vinnugreinafelagið Samskifti ger eina vegleiðing um regluvarni (compliance), sum skal nýtast í nevndararbeiðiðnum hjá felagnum,
- Vinnugreinafelagið Samskifti sendir vegleiðingina um regluvarni til Kappingareftirlitið til góðkenningar innan ársendan,
- At nýggir limir og verandi limir fáa eitt eintak av hesi tilsøgnini og vegleiðingina um regluvarni, og
- At vegleiðingin um regluvarni verður dagført og tøk hjá nevndini og limunum til eina og hvørja tíð.

12. Kappingareftirlitið metir, at tilsøgnin loysir kappingarligu ivamálini á nøktandi hátt. Við veittu tilsøgnini er møguligt at tryggja, at vinnugreinafelagið, Samskifti, ikki samtykkir líkandi leiðreglu. Við vegleiðingini um innanhýsis regluvarni (compliance) verður nevndin upplýst og kunnað um, hvussu vinnugreinafeløg virka í tráð við kappingarlógina. Samstundis ger vegleiðingin um innanhýsis regluvarni tað møguligt hjá komandi nevndum at fáa somu kunning.

13. Eisini er tilsøgnin ein loysn, sum kann fáa virknað beinavegin, soleiðis at feløgini kunnu kappast og virka sjálvstøðugt á marknaðinum. Kappingareftirlitið metir, at hendan loysnin er eins úrslitagóð sum at fáa staðfest brot á §6, stk. 1 í kappingarlógini, tí úrslitið er, at marknaðurin kann virka til fulnar innan stutta tíð, og at vegleiðingin um regluvarni ger, at viðtøkur, leiðreglur, og annað frameftir verða í tráð við kappingarlógina.

14. Kappingareftirlitið hevur lagt dent á, at vinnugreinafelagið, Samskifti, av sínum eintingum strikaði leiðregluna, kunnaði sínir limir um hetta og bjóðaði Kappingareftirlitinum at koma við viðmerkingum um, hvussu tey kundu fáa boðskapin fram, uttan at tað er í stríð við kappingarlógina.

15. Kappingareftirlitið tekur tí ikki endaliga støðu til, um leiðreglan var brot á kappingarlógina.

## 2. Avgerð hjá Kappingarráðnum

Kappingarráðið metir, at givna tilsøgnin, dagfest 27. apríl 2026, gongur teimum ivamálum á møti, sum eru umrødd í parti 4 í hesi avgerð.

Kappingareftirlitið hevur tí avgjørt, at gera tilsøgnina frá vinnugreinafelagnum, Samskifti, bindandi, sbrt. §6, stk. 4, 2. pkt. í kappingarlógini, sbr. §27, stk. 1-3 í kappingarlógini.

## 3. Málslýsing

### 3.1. Inngangur

16. Samskifti er eitt vinnugreinafelag, sum er knýtt at Vinnuhúsinum, har felagið umvegis Vinnuhúsið hevur skrivstovu, heimasíðu og ráðgeving. Síðan hjá Samskifti kann síggjast her: https://www.industry.fo/feloeg/samskifti

17. Vinnugreinafelagið, Samskifti, hevði eina grein á heimasíðu teirra, sum var, at "*Limafelgini í Samskfiti hava av somu orsøk tikið avgerð um, at vit standa saman um ikki at veita kreativt arbeiði ella ráðgevingararbeiði í tilboðsarbeiði, uttan at hóskandi samsýning er við. Ein hóskandi loysn kann eisini vera, at kundar biðja um tilvísingar um líknandi arbeiði, tá biðið verður um tilboð*".[1] Orðingin leggur upp til, at limafeløgini í vinnugreinafelagnum, Samskifti, skulu taka hóskandi samsýning, ella at tey, sum bjóða út, nýta eina hóskandi loysn sum at kunna vísa á tilvísingar og líknandi.

18. Leiðreglan varð viðtikin á aðalfundinum hjá felagnum tann 11.03.2020.

19. Kappingareftirlitið er av tí fatan, at orðingin av leiðregluni møguliga var í stríð við § 6, stk. 1, í kappingarlógini við at samskipa atferðina hjá limafeløgunum í teirra útboðs- og tilboðsarbeiðið. Serliga var hugsað um atferðina hjá limafeløgunum mótvegis almennum stovnum, sum bjóða út.

20. Tann 6. november 2024 varð umbøn um upplýsingar send vinnugreinafelagnum, Samskifti, har biðið varð um at fáa gerðabøkurnar seinastu 5 árini, fundarfrásagnir seinastu 5 árini, samtyktir hjá felagnum seinastu 5 árini og viðtøkur felagsins.[2]

21. Vinnugreinafelagið, Samskifti, lat Kappingareftirlitinum umbidnu upplýsingarnar tann 26. november 2024. Samstundis valdi Samskifti at leggja fram uppskot til broyting av orðingini á heimasíðu teirra um samsýning fyri útboðs- og tilboðsarbeiði.[3] Kappingareftirlitið valdi ikki at taka støðu til uppskotið frá vinnugreinafelagnum, Samskifti, tí Kappingareftirlitið var framvegis í gongd við eftirlitsarbeiði og kundi tí ikki taka støðu til uppskotið.[4]

22. Tá Kappingareftirlitið fór at hyggja nærri eftir gerðabókunum, fann Kappingareftirlitið ymiskt sum bendi á, at tað sannlíkt var talan um brot á kappingarlógina.

23. Kappingareftirlitið valdi tí tann 10. februar 2025 at skriva eina fráboðan um kappingarlig ivamál til vinnugreinafelagið, Samskifti, har greitt var frá teimum hypotesum, sum Kappingareftirlitið arbeiddi við.[5] Eisini var fráboðanin um kappingarlig ivamál eitt høvi hjá vinnugreinafelagnum Samskifti at verða hoyrd í sambandi við eftirlitsarbeiðið hjá Kappingareftirlitinum. ið

24. Tá vinnugreinafelagið Samskifti hevði fingið fráboðanina um kappingarlig ivamál, varð ein fundur avtalaður millum partarnar tann 27. februar 2025. Eftir fundin fekk Samskifti høvið at koma við skrivligum viðmerkingum, sum vórðu latnar Kappingareftirlitinum tann 21. mars 2025.

---

[1] Máls.nr. 24/00453-1: Samskifti – grein um útboð
[2] Máls.nr. 24/00453-3: Umbøn um upplýsingar
[3] Máls.nr. 24/00453-5: Svar uppá umbøn um upplýsingar
[4] Máls.nr. 24/00453-10: Svar uppá viðmerkingar frá Samskifti
[5] Máls.nr. 24/00453-19: Fráboðan um kappingarlig ivamál

25. Í skrivinum frá vinnugreinafelagnum, Samskifti, varð víst á endamálið við leiðregluni, sum var "*at styrkja kappingina við at fleiri limir við henni høvdu møguleika at vera við, og felagið hevur verið av tí fatan, at aðalreglan var óskaðilig.*".[6] Í sama skrivið varð sagt frá, at vinnugreinafelagið, Samskifti, hevði strikað leiðregluna, og at limirnir vóru kunnaðir um hetta tann 3. mars 2025.[7]

26. Viðvíkjandi tí, sum Kappingareftirlitið hevði funnið í gerðabókunum hjá vinnugreinafelagnum, Samskifti, hevði vinnugreinafelagið, Samskifti, hesar viðmerkingar: "*Tað er felagið Samskifti sum hevur vent sær til veitarar viðvíkjandi útboðnum, uttan at limirnir hava verið inndrignir. Tí snýr hetta seg ikki um at samskipa eina atferð, sbrt. § 6, stk. 1 í kappingarlógini, men um eina áheitan frá felagnum Samskfiti til útboðsveitarar um, at fevnir tilboðið um kreativt arbeiði ella ráðgevingararbeiði, eigur hóskandi samsýning at fylgja við. Ein hóskandi samsýning, uttan eina áseting av minsta prísi ella skipan av treytum, men ein avtala sum frítt kann gerast millum útbjóðarar og tilboðsveitara. Talan hevur sostatt ikki verið um samskipan, og álagt hevur ikki verið limum eitt trýst til atferð um ávísum leiðreglum. Felagið samskifti hevur ikki fylgt upp um útbjóðari hava tikið áheitanina til eftirtektar.*"[8]

27. Við hesum í huga vendi Kappingareftirlitið sær til tríggjar tær størstu kommunurnar í landinum, sum eru Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna og Runavíkar kommuna.

28. Til Klaksvíkar kommunu og Runavíkar kommunu varð ein umbøn um upplýsingar send, har biðið varð um at fáa 1) Avrit av keyptum samskiftis tænastum seinastu 5 árini, 2) Avrit av veitarum av samskiftis tænastum seinastu 5 árini og 3) Avrit av samskiftinum millum kommununa og vinnugreinafelagið, Samskifti, um tað hevði verið samskifti millum partarnar.[9]

29. Til Tórshavnar kommunu varð send ein umbøn um upplýsingar, har biðið varð um 1) Avrit av útbjóðingartilfarinum í sambandi við nýggja sniðhondbók, 2) Avrit av samskiftinum um útboðið av sniðhondbókini. Bæði innanhýsis og uttanhýsis samskifti og 3) Avrit av samskiftinum millum vinnugreinafelagið Samskifti og Tórshavnar kommunu. Um einki samskifti hevði verið millum Tórshavnar kommunu og vinnugreinafelagið, Samskifti, so var biðið um at fáa avrit av samskiftinum millum Tórshavnar kommunu og teir veitarar, sum ynsktu at geva tilboð.[10]

30. Tá biðið varð um tilfar frá Tórshavnar kommunu, Runavíkar kommunu og Klaksvíkar kommunu, var tað greitt frammanundan, at har var eitt mál millum Tórshavnar kommunu og vinnugreinafelagið, Samskifti, men Kappingareftirlitið var ikki vitandi um nakað mál millum vinnugreinafelagið, Samskifti, og hinar kommunurnar. Tí valdi Kappingareftirlitið at spyrja Runavíkar kommunu og Klaksvíkar kommunu meira breitt eftir upplýsingum, meðan tað til Tórshavnar kommunu varð avmarkað til tað málið, sum Kappingareftirlitið var vitandi um. Hetta varð gjørt fyri at avmarka nøgdina av tilfarið, sum biðið varð um.

31. Tað gjørdist skjótt greitt, at hvørki Runavíkar kommuna ella Klaksvíkar kommuna høvdu nakað samskifti við vinnugreinafelagið Samskifti. Tó vísti umbønin um upplýsingar, at Runavíkar

---

[6] Máls.nr. 24/00453-25: Viðmerkingar frá felagnum Samskifti
[7] Máls.nr. 24/00453-25: Viðmerkingar frá felagnum Samskifti
[8] Máls.nr. 24/00453-25: Viðmerkingar frá felagnum Samskifti
[9] Máls.nr. 24/00453-28: Umbøn um upplýsingar til Klaksvíkar kommunu og máls.nr. 24/00453-29: Umbøn um upplýsingar til Runavíkar kommunu
[10] Máls.nr. 24/00453-27: Umbøn um upplýsingar

kommuna hevði seinastu árini brúkt umleið [...] kr., um árið upp á samskiftistænastur,[11] meðan Klaksvíkar kommuna vísti á, at tey ongar samskiftistænastur høvdu keypt í umbidna tíðarskeiðinum.[12] Um hetta hevði nakra ávirkan á atferðina hjá vinnugreinafelagnum, Samskifti, mótvegis hesum kommunum, er ógreitt.

32. Tórshavnar kommuna sendi tann 1. mai 2025 umbidnu upplýsingarnar viðvíkjandi útboðnum av sniðhondbókini til Kappingareftirlitið. Sniðhondbókin varð boðin út í desember 2019, har 4 fyritøkur fingu møguleikan at bjóða upp á at gera ein nýggjan "visuellan" samleika til Tórshavnar kommunu. Tær fýra fyritøkurnar, sum vórðu bodnar at luttaka, vóru AnniJanni Sp/f, Nudlavirkið Sp/f, Sansir P/f og Sendistovan Sp/f.[13]

33. Tann 7. januar 2020 sendir vinnugreinafelagið Samskifti ein teldupost til Tórshavnar kommunu við áheitan um at velja annan leist at bjóða út eftir. Ítøkiliga stóð í skrivinum til Tórshavnar kommunu, at "*Vit heita á Tórshavnar kommunu at veita nøktandi samsýning til luttakandi fyritøkur fyri hetta arbeiði, ið kommunan ynskir. Vit mæla tí til, at Tórshavnar kommuna velur ein av fylgjandi møguleikum: Møguleiki 1) At kommunan linkar krøvini og veitir eina samsýning til øll tey bodnu. Til dømis eitt búmerkjauppskot, við kladdum av einum samleika fyri eina samsýning á 50.000 kr. til hvørja fyritøku, eisini skulu tey luttakandi geva kostnaðarmeting uppá liðugtgerð av samleikanum, eina sniðhondbók og verkseting. Við støði í innkomnu uppskotum og kostnaðarmeting velur Tórshavnar kommuna eina fyritøku at arbeiða víðari saman við. Møguleiki 2: At kommunan biður um ítøkiligt tilboð og tilvísingar, og út frá hesum velur eina fyritøku at arbeiða víðari saman við.*"[14]

34. Eitt dømi, um at leiðreglurnar hava havt virknað, er í *gerðabók 2022, Nevndarfundur fríggadag, tann 18.02.2022*, har nevndin í vinnugreinafelagnum Samskifti umrøddi ein fyrispurning frá Keyp Landsins. Fyrispurningurin frá Keyp Landsins var soljóðandi "*Hey* [ráðgevi hjá Vinnuhúsinum] *Eg havi tværreisir fingið fyrispurning her til Keypsportalin um at felagið Samskifti ikki góðtekur tilboð, ið innihalda ein ella annan form fyri kreativitet sum part av vektingini. Kekka aftursvarið herfrá er umiddelbart kan man heldur ikki forbjóða nøkrum í at selja út av sínum kreativitet í samband við eitt tilboð, t.d. onkrum, ið ikki er limur í felagnum. [...] Tá vit skulu svara næstuferð, so kundi eg hugsa mær at havt eitt meira konkret svar, soleiðis at skilja, at vit skilja hvat tit meina við tá tit siga "kreativt arbeiði ella rágevingararbeiði". T.d. hvørjar konsekvensir tað hevur yvirfyri Felagnum Samskifti um man orðar seg uppá tann eina ella annan máta í samband við kreativitet og ráðgeving. 1. Hvat meina tit við tá tit siga "kreativt arbeiði ella ráðgveingararbeiði"? 2. Hava tit nøkur dømir, ið vísa hvat kann bólkast undir hetta slag av arbeiði? 3. Hava tit dømir um hvat ikki kann bólkast undir hetta slag av arbeiði? 4. Hava tit dømi uppá okkurt, ið møguliga liggur á kantinum? 5. Finst nøkur avtala vit kunnu fyrihalda okkum til, ið ger tað almenna t.d. skal, ella hvussu vit kunnu fylgja vegleiðingini hjá tykkum?.*"[15]

35. Til fyrispurningin frá Keyp Landsins, hevði nevndin skrivað fylgjandi niður í gerðabókina "*Fyritøkur spilla nú nógv minni tíð.* [Limur í vinnugreinafelagnum] *nevndi eitt útboð, har tað nú verður biðið um refferensur. Hansara tilboð tók uml. hálvan dag, ímun til fýra dagar, sum tað hevði tikið, um útboðið ikki fylgdi*

---

[11] Máls.nr. 24/00453-44: Umbøn um upplýsingar
[12] Máls.nr. 24/00453-45: Umbøn um upplýsingar
[13] Máls.nr. 24/00453-37: Samskifti um tilboð uppá sniðhandbók
[14] Máls.nr. 24/00453-37: Samskifti um tilboð uppá sniðhandbók
[15] Máls.nr. 24/00453-5: Umbøn um upplýsingar

*leiðreglunum hjá Samskifti. Nevndin tosaði eisini um at gera eitt hugsað dømi. Finna dømir úr veruliga lívinum. Man kann ikki biða um at fáa eini hús teknað fyri at vita um fyritøkan dugir at tekna. Tá er nokk at vísa til áður teknaði hús, sum jú vísa at fyritøkan dugir at tekna. Leiðreglurnar eru sera viðkomandi í samband við heimasíður og samleikar,*".[16]

36. Hetta er farið fram eftir at leiðreglan er samtykt, sum vísir at vinnugreinafelagið, Samskifti, hevur heitt á fleiri stovnar um at fylgja hesa leiðreglu. Somuleiðis viðgongur vinnugreinafelagið, Samskifti, at leiðreglan verður fylgd. Hóast einki mál er nevnt, eftir at leiðreglan varð viðtikin, er tað greitt av gerðabókunum, at vinnugreinafelagið, Samskifti, er av tí fatan, at teirra leiðregla hevur havt virknað og týdning fyri teirra arbeiðið.

### 3.2. Partarnir

37. Reklamufelagið varð stovnað í 2002 við tí endamáli at savna føroysku lýsingarfyritøkurnar og taka sær av teirra yrkisligu, felagsligu og fíggjarligu áhugamálum. Reklamufelagið skifti navn í 2009, og hevur síðani havt navnið Samskifti.

38. Av teimum áhugamálum, sum vinnugreinafelagið, Samskifti, arbeiðir við, hevur vinnugreinafelagið, Samskifti, lagt seg eftir, at lýsingarfyritøkur skulu hava góðar og javnbjóðis treytir at virka undir. Samskifti ynskir, at útboð eru gjøgnumskygd og væl úr hondum greidd.

39. Nevndin í vinnugreinafelagnum, Samskifti, er mannað við Michael Koba, formanni, Róki Jákupsson Jacobsen, næstformanni, Barbaru Mariu Lamhauge, nevndarlimi, og Niels Uni Dam, nevndarlimi, sambært heimasíðu felagsins fyri árið 2025.[17]

40. Av teimum nevndarlimum, sum vóru við til at samtykkja leiðregluna um útboðs- og tilboðsarbeiði, er tað í dag bara Niels Uni Dam og Michael Koba, sum eru eftir í nevndini. Rókur Jákupsson Jacobsen varð valdur í nevndina í 2023, og Barbara Maria Lamhauge varð vald í nevndina í 2025.

41. Vinnugreinafelagið Samskifti er knýtt at Vinnuhúsinum, har tey hava skrivstovu og kunnu nýta ráðgevarar hjá Vinnuhúsinum. Vinnugreinafelagið Samskifti hevur ein fastan ráðgeva frá Vinnuhúsinum, sum í løtuni er Bára Gunnarsdóttir.

42. Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum er eitt yvirlit yvir limirnar í vinnugreinafelagnum, Samskifti, sum seinast varð dagført 24. juni 2025. Eitt lima yvirlit sæst her:

[16] Máls.nr. 24/00453-5: Umbøn um upplýsingar
[17] Máls.nr. 24/00453-48: Yvirlit yvir nevndini fyri árið 2025.

Mynd 1: Lima yvirlit[18]

| Virki | Bygd/bý | Telefon | Heimasíða |
|---|---|---|---|
| Base | Tórshavn | 273159 | www.base.fo |
| Grafia | Klaksvík | 227072 | www.gamlaseglhusid.fo |
| Hugarok | Tórshavn | 201515 | www.hugarok.fo |
| Jacobsen Consultancy | Saltangará | 505900 | |
| Kovboy Film | Hvítanes | | www.kovboyfilm.com |
| Nudlavirkið | Argir | 761010 | www.nudlavirkid.fo |
| Sansir | Tórshavn | 355355 | www.sansir.fo |
| Savna | Tórshavn | 517950 | www.savna.fo |
| Sendistovan | Tórshavn | 347150 | www.sendistovan.fo |
| Teima Ráðgeving | Tórshavn | 277474 | www,teima.fo |
| Virka | Tórshavn | 781010 | www.virka.fo |

43. Sambært heimasíðuni hjá vinnugreinafelagnum Samskifti (umvegis heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum) eru flestu føroysku lýsingarfyritøkur limir í vinnugreinafelagnum, Samskifti. Leikluturin hjá vinnugreinafelagnum, Samskifti, kann tí hava stóra ávirkan á, hvussu limafeløgini skipa seg og atferðina hjá limunum sum heild.

44. Hyggja vit eftir samlaða marknaðinum fyri samskiftistænastur og samskiftisráðgeving, er mest umboðandi NACE-kodan M73.11 Lýsingarstovnar. Við NACE-koduni M73.11 Lýsingarstovnar, er umsetningurin á marknaðinum skrásettur til at vera 62,3 milliónir krónur í 2024.[19] Talið er frá dátugrunninum hjá Hagstovu Føroya.

45. Orsøkin til at NACE-kodur verða nýttar, er tí at hetta er ein altjóða standardur, har tað ber til at máta vinnugreinar eftir standardiseraðum mátum. Í hesum førinum er NACE-kodan nýtt til at síggja samlaða umsetningin á marknaðinum fyri lýsingarstovnar. Við hesum dátagrundalagnum verður hugt eftir marknaðarpartinum hjá einstøku limafeløgunum seinastu trý árini, og hvønn marknaðarpart limafeløgini hava í mun til marknaðin sum heild.

46. Fyrst verður hugt eftir marknaðinum seinastu trý árini.

Mynd 2: Marknaðurin flokkaður eftir umsetningi.

---

[18] Máls.nr. 24/00453-49: Limayvirlit

[19] https://statbank.hagstova.fo/pxweb/fo/H2/H2__VB__VB05/vb_nace_utg.px/eb

| Marknaðurin flokkaður eftir NACE-koduni M73.11 Lýsingarstovnur | | | |
|---|---|---|---|
| | 2022 | 2023 | 2024 |
| Marknaðurin | 60.381.164,00 kr. | 61.887.400,00 kr. | 62.307.438,00 kr. |

47. Síðani verður hugt eftir samlaðu marknaðarpørtunum hjá limafeløgunum í vinnugreinafelagnum Samskifti, har tað sæst týðiligt, at limafeløgini standa fyri bróðurpartinum av umsetninginum á marknaðinum fyri NACE-koduni M73.11 Lýsingarstovnar.

Mynd 3: Samlaði marknaðarparturin hjá limafeløgunum í Samskifti í prosent.

| Marknaðarparturin hjá limafeløgunum í vinnugreinafelagnum Samskifti | | | |
|---|---|---|---|
| | 2022 | 2023 | 2024 |
| Marknaðurin | 100,00% | 100,00% | 100,00% |
| Vinnugreinafelagið Samskifti | 91,97% | 96,31% | 91,79% |

48. Um hugt verður eftir marknaðarpørtunum hjá fyritøkunum í mun til samlaða umsetninginum á marknaðinum, eru marknaðarpartarnir hjá limafeløgunum seinastu trý árini fylgjandi:

Mynd 4: Marknaðarpartar hjá einstøku limafeløgunum í mun til umsetning.

| Marknaðarpartar | | | |
|---|---|---|---|
| | 2022 | 2023 | 2024 |
| Base Sp/f | 0,94% | 0,98% | 1,16% |
| Grafia Sp/F | 2,67% | 2,97% | 3,23% |
| Hugarok | 0,94% | 0,66% | 0,41% |
| Jacobsen Consultancy | 0,00% | 0,00% | 0,69% |
| Kovboy Film | 2,14% | 2,81% | 1,91% |
| Nudlavirkið | 9,43% | 9,64% | 6,89% |
| Sansir | 27,34% | 31,04% | 29,12% |
| Savna Sp/f | 2,39% | 3,33% | 3,89% |
| Sendistovan | 36,91% | 34,62% | 35,62% |
| Teima Ráðgeving | 1,04% | 1,58% | 0,00% |
| Virka | 8,15% | 8,69% | 8,86% |
| Samlað | 91,97% | 96,31% | 91,79% |

49. Tað hevur ikki verið møguligt at fáa umsetningin fyri Teima Ráðgevin fyri árið 2024. Jacobsen Consultancy varð stovnað í 2024 og hevði tí ongan umsetning í 2022 og 2023.

### 3.3. Marknaðarlýsing

50. Vinnugreinafelagið, Samskifti, er vinnugreinafelag fyri lýsingarfyritøkur sambært lýsingini á heimasíðuni.[20] Marknaðurin fyri tænastur, veittar av limafeløgunum, eru tí samskiftistænastur, samskiftisráðgeving, lýsingartænastur og annað í hesum sambandi.

51. Leiðreglan um útboð- og tilboðsarbeiði fevndi um alt kreativt- og ráðgevingararbeiði. Leiðreglan kann tí ikki sigast at verða avmarkað til ávísar tænastur hjá limunum í vinnugreinafelagnum, Samskifti, men fevndi um alt kreativt- og ráðgevingararbeiðið, sum lýsingar- og samskiftisfeløgini gera. Ítøkiliga verður nevnt kreativt arbeiði og ráðgevingararbeiði. Sannlíkt er, at limirnir fáast mest við samskiftistænastur og samskiftisráðgeving.

52. Kreativt arbeiði í útboðs- og tilboðsarbeiði hava tað eyðkennið, at lýsingarfyritøkur verða bidnar um at koma við uppskotum og skitsum fyri at kappast um at vinna útboðið ella tilboðið at gera arbeiðið fyri tann, sum umbiður tænastuna. Millum annað er tað ikki óvanligt, at arkitektar luttaka í tekni- ella skitsukappingum, at lýsingarfyritøkur gera skitsur til sniðhondbøkur, búmerkir og lýsingarátøk. Hetta oftast uttan at fáa fulnað fyri sínar kostnaðir.

53. Marknaðartreytirnar fyri lýsingar- og samskiftistænastur eru líkar treytunum hjá teimum sum virka innan tænastuvinnuna, har fyritøkurnar veita tænastur heldur enn eitt ítøkiligt úrslit. Hinvegin eru lýsingar- og samskiftistænastur ein vøra, sum verður skapt. Tí er tað torført at gera eina nágreiniliga lýsing av marknaðinum fyri hesum tænastum. Samanumtikið er tað innsatsurin, sum hevur týdning heldur enn úrslitið.

54. Fyri at reka eina samskiftis- ella lýsingarfyritøku er neyðugt við ávísum amboðum. Her verður hugsað um teldu, applikatiónir til at viðgera myndir og tekstir, programmir og tilfar at sniðgeva við. Marknaðurin fyri samskiftis- og lýsingartænastur er annars sermerktur við, at ein og hvør kann framleiða samskiftis- og lýsingartilfar við sera fáum avmarkingum. Hetta er, tí at vøran, sum verður seld, er tað kreativa hugskotið og tær kreativu loysnirnar.

55. Samskiftis- og lýsingarfyritøkur kunnu tí flokkast við vinnur, ið hava lágar atkomuavmarkingar, har prísur og kvalitetur eru kappingaramboðini. Tí kunnu fleiri stovna og reka samskiftis- og lýsingarfyritøkur uttan at gera stórar íløgur í amboð, verkstaðsbúnað ella framleiðslueindir.

### 3.4. Hoyringssvar

56. Kappingareftirlitið sendi tann 10. februar 2025 umvegis teldupost fráboðan um kappingarlig ivamál til vinnugreinafelagið, Samskifti.[21] Í fráboðanini um kappingarlig ivamál greiddi Kappingareftirlitið frá teimum hypotesum, sum Kappingareftirlitið arbeiddi eftir. Tann hypotesan, sum Kappingareftirlitið arbeiddi útfrá var, at atferðin hjá vinnugreinafelagnum, Samskifti, mótvegis almennum myndugleikum í sambandi við útboð møguliga var í stríð við ásetingina í § 6, stk. 1, sbrt. § 6, stk. 3, í kappingarlógini. Kappingareftirlitið vísti samstundis á, at tað var serliga tann samskipaða atferðin, sum hevði til endamáls at avmarka kappingina um samskiftistænastur í útboðs- og tilboðsarbeiðið.

---

[20] Máls.nr. 24/000453-2: Yvirlit av heimasíðuni hjá Samskifti, dagfest 06.12.2024
[21] Máls.nr. 24/00453-57: Fráboðan um kappingarlig ivamál

57. Vinnugreinafelagið Samskifti sendi tann 21. mars 2025, umvegis teldupost, viðmerkingar til fráboðanina um kappingarlig ivamál til Kappingareftirlitið. Niðanfyri verður endurgivið viðkomandi viðmerkingar til fráboðanina um kappingarlig ivamál.[22]

> *Tað hevur á ongan hátt verið ætlanin hjá Samskifti, at atferð felagsins skal vera í stríð við nakra lóggávu. Felagið viðurkennir fráboðanina um møguligt brot á atferðina og harmast um, at endamálið við atferðini, sum var at virka fyri áhugamálum limum felagsins, kann vera í stríð við kappingarlógina.*
>
> *Viðv. litra a), b), c) og f)*
>
> *Tann 31.01.2020 vóru AnniJanni á fundi í felagnum Samskifti. Á fundinum varð ikki umrøtt um AnniJanni skuldu verða koyrd úr felagnum. Hetta varð einans vent á nevndarfundi, men bleiv ikki sett í verk.*
>
> *Á fundinum varð greitt AnniJanni frá einum fundi sum hevði verið millum Tórshavnar kommunu og limirnar í Samskifti, sum AnniJanni ikki vóru møttar til. Luttakandi limir í Samskifti høvdu greitt Tórshavnar kommunu frá, at skitsuuppskotið kostaði at gera og biðið varð um at longda freist til tilboðið. Tórshavnar kommuna hevði greitt frá, at øll tilboð, um ikki innihalda skitsu, skuldu verða vrakað. Eftir fundin við Tórshavnar kommunu vóru limirnir samdir um at gera eitt felags skriv til Tórshavnar kommunu um at fáa hetta broytt, og at tað tí var óheppið at AnniJanni uttanum hetta høvdu sent svar til Kommununa.*
>
> *AnniJanni fóru ikki úr felagnum.*
>
> *Seinni tók Tórshavnar Kommuna útboðið um búmerki aftur og enn hevur líkandi útboð ikki verið boðið út av kommununi, sum framvegis hevur sama búmerki, sum í ár 2020.*
>
> *Tann 19.03.2021 senda AnniJanni teldupost til Vinnuhúsið um at melda seg úr sum lim í Samskifti, eftir at rokningin fyri limagjaldið í Samskifti varð send teimum.*
>
> *Í sambandi við innkrevjing av limagjaldi fyri limafyritøkur í Vinnuhúsinum, er vanligt at síggja at onkur har ímillum sigur sín limaskap upp.*
>
> *Viðv. litra e)*
>
> *Tað er felagið Samskifti sum hevur vet sær til veitarar viðvíkjandi útboðunum, uttan at limirnir hava verið inndrignir. Tí snýr hetta seg ikki um at samskipa eina atferð sbrt. § 6, stk. 1 í kappingarlógini, men um eina áheitan frá felagnum Samskifti til útboðsveitarar um, at fevnir tilboðið um kreativt arbeiðið ella ráðgevingararbeiði, eigur hóskandi samsýning at fylgja við. Ein hóskandi samsýning, uttan eina áseting av minsta prísi ella skipan av treytum, men ein avtala sum frítt kann gerast millum útbjóðara og tilboðsveitara.*
>
> *Talan hevur sostatt ikki verið um samskipan, og álagt hevur ikki verið limum eitt trýst til atferð um at fylgja ávísum leiðreglum.*
>
> *Felagið Samskifti hevur ikki fylgt upp um útbjóðari hava tikið áheitanina til eftirtektar.*
>
> *Viðv. litra h)*

[22] Máls.nr. 24/00453-25: Viðmerkingar frá vinnugreinafelagnum Samskifti

*Eftir áheitan frá 4 limum. sum vórðu bodnir at luttaka í einum avmarkaðum útboði hjá Tórshavnar kommunu, ið kravdi umfatandi kreativt arbeiði uttan nakra samsýning, tók felagið Samskifti málið upp við Tórshavnar kommunu. Samskifti heitti á Tórshavnar kommunu um at endurskoða útboðstreytirnar og annað hvørt strika kravið um kreativt upplegg ella veita eina ávísa samsýning fyri hetta arbeiðið. Á aðalfundi 11.03.2020 greiddi nevndin limunum frá hesum málið og tosað var um manglandi virðing fyri – ella vantandi innlit í okkara yrki, og samtykt varð á aðalfundinum at gera orðingina av vegleiðandi leiðreglum viðvíkjandi útboðnum.*

*Viðv. litra l)*

*Greitt varð Innkeypi Landssins, Kim Hansen, frá, at hóskandi samsýning eigur at verða givin fyri at veita kreativt arbeiði ella ráðgevingararbeiði í tilboðsarbeiðnum. Víst varð harumframt á, at ein hóskandi loysn er, at kundar ístaðin biðja um tilvísingar um líknandi arbeiði, tá tilboð verður umbiðið. Og um talan er um tilboð uppá heimasíðu, kann vísast til aðrar líknandi heimasíður, ið samskiftisfyritøkan hevur gjørt, ella sum fyritøkan ætlar at brúka sum íblástur.*

*Samanumtikið*

*Felagið Samskifti hevur ikki havt ætlanir um at samskipa atferðina hjá limum felagsins í sambandi við útboð. Endamálið við leiðreglunum hevur einans verið at vísa á týdning av, at kreativt arbeið eigur at vera samsýnt. Einhvør útbjóðari fær og hevur fingið tilboð ókeypis, og metir felagið Samskifti ikki, at tilmælini í leiðreglunum um útboð hava ført við sær eina atferð hjá limum felagsins.*

*Felagið Samskifti hevur tó nú avgjørt at strikað leiðregluna og viðurkennir at tað er óheppið, at felagið ikki kendi til tilsøgnina, sum Kappingarráðið gav felagnum 5. oktober 2009. Tó metir felagið ikki, at grundalag er fyri at sekta hvørki felagið ella limir felagsins, tí tað er sera ivasamt um leiðreglan hevur havt nakran týdning yvirhøvur fyri kappingina á økinum og tíðarásin hjá Kappingareftirlitinum vísur ei heldur, at nakað alment útboð hevur verið broytt ella afturkallað grundað á leiðreglurnar, ella at atferðin hjá limum felagsins hevur verið skipað.*

58. Hoyringssvarið, hjá vinnugreinafelagnum Samskifti, tekur útgangsstøðið í fráboðanini um kappingarlig ivamál og einum fundi millum Samskifti og Kappingareftirlitinum, eftir at vinnugreinafelagið Samskifti hevði havt møguleikan at umrøða fráboðanina um kappingarlig ivamál innanhýsis.

59. Kappingareftirlitið metir at hoyringssvarið ikki broytir fatanina av málinum. Her skal serliga vísast á, at vinnugreinafelagið Samskifti kom við einum uppskoti um samsýning á 50.000 kr til hvønn luttakara ella møguleikan at senda inn tilvísingar til líknandi arbeiðið, til Tórshavnar kommunu. Leiðreglan, sum varð viðtikin, minnir um felagsskrivið, har krav er um hóskandi samsýning ella tilvísing til líknandi arbeiðir. Sannlíkt er tí, at leiðreglan er grunda á uppskotinum frá vinnugreinafelagnum Samskifti í felagsskrivinum til Tórshavnar kommunu. Eisini skal vísast á, at vinnugreinafelagið Samskifti hevur vent sær til stovnar, myndugleikar og onnur, við áheitan um at fylgja leiðregluni. Her skal vísast á samskifti millum Kim Hansen úr Keyps Landsins og vinnugreinafelagið Samskifti, sammett við framsøguna hjá táverandi formanni, Niels Uni Dam, um at leiðreglan verður fylgd og at arbeiðið hjá teimum gerst lættari.

## 4. Meting

### 4.1. Marknaðarskilmarking

60. Sambært § 6, stk. 1, í kappingarlógini, er ikki loyvt tveimum ella fleiri fyritøkum at gera eina avtalu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hevur til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina. Forboðið fevnir eisini um viðtøkur í samtøku av fyritøkum og samskipan millum fyritøkur, sbrt. §6, stk. 3, í kappingarlógini.

61. Í sambandi við mál eftir §6, stk. 1, í kappingarlógini, er neyðugt at skilmarka viðkomandi vøru- og landafrøðiliga marknað, sbrt. § 5, í kappingarlógini. Hetta er fyri at finna útav, hvørjar vørur ella tænastur eru í kapping við hvørja aðra og hvørjir aktørar eru á marknaðinum. Endamálið er at staðfesta, hvørjar fyritøkur kunnu leggja eitt kappingarligt trýst á ávísa ella ávísar fyritøkur.

62. Í §5 í kappingarlógini er ásett at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknað. Hetta er fyri at staðfesta í hvønn mun fyritøkan/fyritøkurnar er/eru undir kappingarligum trýsti. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varasetingin í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping skal kannast um tað er neyðugt. Kappingareftirlitið er ikki avmarkað til einans at nýta varaseting, men kann nýta aðrar hættir eisini..[23]

### 4.2. Viðkomandi marknaður

63. Í sambandi við at skilmarknað viðkomandi marknað, skal bæði viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður staðfestast. Hetta merkir at kanningin skal staðfesta um tað eru aðrar vørur á marknaðinum, sum kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum aktørarnir veita. Eisini skal landafrøðiliga støddin á marknaðinum staðfestast. Landafrøðiligi marknaðurin er tað økið, har aktørarnir selja ella keypa vørur og tænastur, har kappingarligu umstøðurnar eru so mikið eins, og sum líkjast teimum, sum eru galdandi í grannaøkjunum.

64. ES-kommissiónin hevur gjørt eina vegleiðing, C/2024/1645, Kommissionens meddelelse om afgrænsning af det relevante marked i forbindelse med Unionens konkurrenceret (kunngerð um at skilmarka viðkomandi marknað), sum kann nýtast at skilmarka viðkomandi marknað. Kunngerðin er gjørd eftir ES-reglunum í TEUF art. 101 og 102, sum svara til § 6 og § 11, í kappingarlógini. Í kunngerðini um at skilmarka viðkomandi marknað, verður skilt millum viðkomandi marknað eftir § 6 um kappingaravlagandi avtalur og § 11 um misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu. Tað verður í hesum sambandi hugt eftir hvussu skilmarkingin av viðkomandi marknað kann gerast eftir § 6 um kappingaravlagandi avtalur.

65. ES-kommissiónin ger greitt í síni kunngerð um at skilmarka viðkomandi marknað, at skilmarkingin verður nýtt til at finna útav um tað fyriliggur ein kappingaravleiðing av kappingini sum merkis, ella til at meta um hvørt treytirnar fyri frítøku eru loknar.[24] Mannagongdin hjá ES-kommissiónini er at gera eina skilmarking av viðkomandi marknað viðvíkjandi kappingaravlagandi avtalum, ið hava sum fylgju at avlaga, avmarkað ella reingja kappingina.[25] Hinvegin verður tað ikki mett neyðugt at

[23] LM-098/2022, s. 31-32
[24] C/2024/1645, Kommissionens meddelelse om afgrænsning af det relevante marked i forbindelse med Unionens konkurrenceret, reglubrot 9.
[25] C/2024/1645, Kommissionens meddelelse om afgrænsning af det relevante marked i forbindelse med Unionens konkurrenceret, reglubrot 9.

skilmarka viðkomandi marknað, tá mett verður, at kappingaravlagandi avtalan hevur sum endamál at avlaga, avmarkað ella reingja kappingina.[26]

66. Vegleiðingin hjá ES-kommissiónini um hvørt tað er neyðugt hjá kappingarmyndugleikum at gera eina skilmarking av viðkomandi marknaði í sambandi við §6 um kappingaravlagandi avtalur, er staðfest í ES-dómsvenjuni, har ES-dómstólurin hevur staðfest omanfyrinevnda útgangsstøði. Hetta varð millum annað gjørt í dómunum T-44/00, *Mannesmannöhren-Werke mod Kommissionen,* reglubrot 132, T-62/98, *Volkswagen mod Kommissionen*, reglubrot 230 og T-216/13, *Telefónica mod Kommissionen*, reglubrot 214.

67. Kappingarmyndugleikar vilja tí altíð gera eina skilmarking av viðkomandi marknaði, men er talan um brot á § 6 í kappingarlógini, ið hevur sum endamál at avmarka kappingina, er tað ikki neyðugt at gera eina endaliga skilmarking av viðkomandi marknaði, um úrslitið ikki broytist.[27]

### 4.2.1. Viðkomandi vørumarknaður

68. Viðtøkan av leiðregluni hjá vinnugreinafelagnum, Samskifti, var rættað móti útboðs- og tilboðsarbeiði. Tí kundi viðkomandi vørumarknaður skilmarkast til samskiftistænastur og samskiftisráðgeving í útboðs- og tilboðsarbeiði, men metir Kappingareftirlitið, at hendan skilmarkingin er ov smøl.

69. Um hugt verður eftir eftirspurnings- og útboðsvarasetingini, so er eftirspurningurin eftir samskiftistænastur og samskiftisráðgeving tænastur við slíkum eyðkenni, at tær ikki kunnu varasetast við aðrar vørur grundað á tað kreativa eyðkennið sum tænasturnar hava.

70. Um hugt verður eftir útboðsvarasetingini, er tað møguligt, at ein varandi broyting í prísinum ger at fyritøkur, stovnar og myndugleikar velja at skipa samskiftistænasturnar og samskiftisráðgevingina innanhýsis. Hetta er eisini ein avbjóðing, sum vinnugreinafelagið, Samskifti, umrøddi í *gerðabók 2021, nevndarfundur – Kanning av vinnugreinini mikudag, tann 12.05.2021.*[28] At feløg heldur velja at hava samskiftiseindir innanhýsis í fyritøkuni, er ein kapping, sum samskiftisfyritøkurnar ikki kunnu kappast við. Tað er tí ikki møguligt at rokna innanhýsis marknaðardeildir við í skilmarkingini av viðkomandi marknaði, tí tær bjóða ikki sínar tænastur út á marknaðin.[29] Tí skal hyggjast eftir, um aðrar fyritøkur høvdu valt at bjóða samskiftistænastur og samskiftisráðgeving burturav, um prísurin á samskiftistænastum og samskiftisráðgeving hækkaði 5-10%.

71. Fyri at meta um hvørt aðrir aktørar høvdu umskipað sítt virksemi til at veita samskiftistænastur og samskiftisráðgeving við einari varandi príshækking á 5-10%, er neyðugt at hyggja eftir møguleikanum at koma inn á marknaðin. Marknaðurin er eyðsýndur á tann hátt, at tað ikki krevur eins nógvar íløgur at byrja virksemi innan veiting av samskiftistænastum og samskiftisráðgeving

[26] C/2024/1645, Kommissionens meddelelse om afgrænsning af det relevante marked i forbindelse med Unionens konkurrenceret, reglubrot 9.
[27] C/2024/1645, Kommissionens meddelelse om afgrænsning af det relevante marked i forbindelse med Unionens konkurrenceret, reglubrot 20
[28] Máls.nr. 24/00453-5: Umbøn um upplýsingar
[29] C/2024/1645, Kommissionens meddelelse om afgrænsning af det relevante marked i forbindelse med Unionens konkurrenceret, reglubrot 6.

sum í aðrar vinnur eitt nú framleiðsluvirkir. Tað kann tí metast sum ósannlíkt, at kostnaðurin at byrja eina samskiftisfyritøku er ein avbjóðing í sjálvum sær.

72. Ein fyritøka, sum fæst við veiting av samskiftistænastum og samskiftisráðgeving, hevur eitt kreativt eyðkenni, sum ger, at fyritøkur, stovnar og onnur ynskja hesar tænasturnar. At byrja eitt felag, sum fæst við samskiftistænastur og samskiftisráðgeving er tí ikki eins og at byrja eitt framleiðsluvirki. Vøran, sum samskiftisfyritøkan selur, er tað góða hugskotið, tað rætta orðatakið og ta málrættaðu lýsingina. Tí er tað óhugsandi, at ein fyritøka fer undir hetta virksemið, bert tí prísurin hækkar við 5-10%, um fyritøkan ikki kann veita tað kreativa eyðkennið sum samskiftisfyritøkur hava.

73. Tað er tí ikki møguligt at finna eina varaseting, har aðrar tænastur kunnu koma ístaðin fyri samskiftistænastur og samskiftisráðgeving.

74. Kappingareftirlitið skilmarkar tí viðkomandi vørumarknað til samskiftistænastur og samskiftisráðgeving. Kappingareftirlitið metir at skilmarkingin kann gerast endalig við hesari skilmarkingini, men velur Kappingareftirlitið ikki at gera eina endaliga skilmarking, tí úrslitið av einari neyvari ella breiðari skilmarking ikki hevði broytt niðurstøðuna.

#### 4.2.2. Viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin

75. Viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin skal skilmarkast við støði í tí marknaði, har luttakandi fyritøkur selja ella umbiðja vørur og tænastur við eins kappingartreytum, sum kunnu skiljast frá øðrum landafrøðiligum marknaðum, tí kappingartreytinar eru annaðleiðis á tí landafrøðiliga marknaðinum, sbrt. viðmerkingunum til kappingarlógina, s. 31 og ES-dóminum Schneider Eletric, reglubrot 153.[30]

76. Vinnugreinafelagið Samskifti hevur sítt virksemi í Føroyum, har tað virkar fyri føroyskar lýsingarfyritøkur. Orðingin av leiðregluni, sum varð viðtikin, var á føroyskum og legði serligan dent á útboðs- og tilboðsarbeiði.

77. Tá leiðreglan varð viðtikin av limafeløgunum í vinnugreinafelagnum, Samskifti, varð orðingin viðtikin fyri at betra um umstøðurnar hjá samskiftisfyritøkunum á føroyska marknaðinum. Orðingin var einans á føroyskum og hevur ikki verið týdd til onnur mál.

78. Orðingin kann tí ikki sigast at hava týdning uttan fyri landoddarnar.

79. Kappingareftirlitið skilmarkar tí viðkomandi marknað til Føroyar. Skilmarkingin av landafrøðiliga marknaðinum er ikki endalig.

#### 4.2.3. Ávegis niðurstøða um viðkomandi marknað

80. Viðkomandi vøru- og landafrøðiligi marknaðurin verður skilmarkaður til samskiftistænastur og samskiftisráðgeving í Føroyum. Skilmarkingin gerst ikki endalig, tí vinnugreinafelagið Samskifti hevur veitt eina tilsøgn, sum loysir tey kappingarligu ivamálini, sum eru. 4.3. §6 í kappingarlógini

81. Sambært § 6, stk. 1 í kappingarlógini er ikki loyvt tveimum ella fleiri fyritøkum at gera avtalur, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina. Forboðið fevnir

[30] LM-098/2022, s. 31 og T-310/01, *Schneider Electric mod Kommissionen*, reglubrot 153.

eisini um viðtøkur í samtøku av fyritøkum og samskipan millum fyritøkur, sbrt. § 6, stk. 3, í kappingarlógini.

82. Fyri at staðfesta brot á § 6, stk. 1, í kappingarlógini er krav um at fylgjandi fýra treytir eru loknar:

i. Fyritøkur ella samtøka av fyritøkum, ið
ii. gera eina avtalu, viðtøku ella eina samskipan, sum
iii. beinleiðis ella óbeinleiðis hava til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina, og
iv. at avmarkingin ella avlagingin merkist.

83. Í § 6, stk. 2, í kappingarlógini verða nevnd nøkur dømir um avtalur, sum eru kappingaravlagandi. Dømir um avtalur sum eru kappingaravlagandi:

1) at áseta keypsprísir, søluprísir ella aðrar viðskiftatreytir,

2) at avmarka ella stýra framleiðslu, sølu, tøkniligari menning ella íløgum,

3) at býta sundur marknaðir ella veitingarkeldur,

4) at áseta ymiskar treytir fyri veitingum, ið hava sama virði, mótvegis handilsfelagum, sum av tí verða verri fyri í kappingini,

5) at seta sum treyt fyri at gera eina avtalu, at avtaluparturin eisini góðkennir ískoytisveitingar, sum hvørki natúrliga ella sambært handilssiðvenju hava samband við innihaldið í avtaluni,

6) at tvær ella fleiri fyritøkur samskipa teirra kappingarligu atferð við at skipa samváða, ella

7) at seta bindandi prísir á víðarisølu ella á annan hátt at virka fyri, at ein ella fleiri fyritøkur ikki víkja frá vegleiðandi søluprísum.

84. Dømini eru ikki úttømandi og aðrar avtalur kunnu tí eisini vera kappingaravlagandi.

### 4.3.1. Hugtakið fyritøka í kappingarlógini

85. Tað er í § 2 í kappingarlógini greitt ásett, at lógin fevnir um "*øll sløg av vinnuvirksemi og almennum stuðli til vinnuvirksemi.*". Hetta vil siga, at eitt hvørt virksemi, sum er at meta sum vinnuvirksemi, er í útgangstøðnum fevnt av kappingarlógini. Viðmerkingarnar til kappingarlógina siga eisini, at hugtakið vinnuverksemi skal skiljast í breiðari merking.[31]

86. Tað er tí uttan týdning hvat fyri slag av vinnuvirksemi viðkomandi rekur, so leingi tað kemur undir hugtakið vinnuvirksemi. Eisini er tað uttan týdning, um virksemið ikki hevur nakran búskaparligan vinning við sær.[32]

87. Í § 6, stk. 1, í kappingarlógini um kappingaravlagandi avtalur er ásett, at talan skal vera um avtalur millum fyritøkur og onnur. At tað er ásett í § 6 í kappingarlógini, at forboð er hjá fyritøkum og øðrum at gera avtalur, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina, skal skiljast í samsvari við § 2, stk. 1, at ásetingin er galdandi fyri avtalu millum feløg, persónar, myndugleikar og felagsskapir, sum reka vinnuvirksemi.

[31] LM-098/2022, s. 27
[32] LM-098/2022, s. 27

88. Tað at hugtakið fyritøka skal skiljast í samsvari við § 2, stk. 1, í kappingarlógini um vinnuvirksemi, er ikki ásett í lógini ella í viðmerkingunum, men er føst siðvenja í donsku- og ES-dómsvenjuni. Í lógarviðmerkingunum er hartil viðmerkt, at kappingarlógin er grundað á ES-kappingarreglur.[33] Hugtakið fyritøka kann tí ikki víkja frá orðingini í § 2, stk. 1, í kappingarlógini um vinnuvirksemi, tí annars hevði endamálið við forboðnum móti kappingaravlagandi avtalum ongan virknað havt.

89. Forboðið í § 6 í kappingarlógini er tí galdandi fyri avtalur millum feløg, persónar og felagsskapir ið reka vinnuvirksemi.

90. Umframt tær fyritøkur, sum koma undir hugtakið í § 2, stk. 1, í kappingarlógini, er ásett í § 6, stk. 3, í kappingarlógini, at ásetingin eisini fevnir um viðtøkur í samtøku av fyritøkum og samskipan millum fyritøkur. Í viðmerkingunum er ásett, at "*Hugtakið samtak av fyritøkum, fevnir um øll sløg av vinnugreinafeløgum og samskipaðum samstarvi í einum og hvørjum sniði millum fyritøkur.*"[34]

91. Vinnugreinafelagið, Samskifti, er tí fevnt av forboðnum í § 6, stk. 1, sbrt, § 6, stk. 3, í kappingarlógini.

### 4.3.2. Avtala, viðtøka ella samskipan

92. Tá hugt verður eftir, um ein avtala, viðtøka ella samskipan er í stríð við forboðið í § 6, stk. 1, í kappingarlógini um kappingaravlagandi avtalur, er fyrst neyðugt at staðfesta hvat fyri slag av avtalu, viðtøku ella samskipan atferðin er.

93. Um avtalur millum fyritøkur siga viðmerkingarnar til kappingarlógina, at " *Avtaluhugatakið í kappingarrættinum skal skiljast breiðari enn avtaluhugtakið í obligatiónsrættinum. Sambært obligatiónsrættinum ein bindandi avtala gjørd, tá eitt tilboð hevur fingið samsvarandi góðkenning. Avgerandi fyri, hvørt ein avtala er gjørd sambært kappingarrættinum er, um minst tvær fyritøkur hava sýnt felags vilja um ávísa atferð á marknaðinum.*"[35]

94. Um viðtøku millum fyritøkur siga viðmerkingarnar til kappingarlógina at " *Hugtakið viðtøka kann bæði fevna um viðtøkur, avgerðir og fráboðanir. Tað er einki krav, at viðtøkan er løgfrøðiliga bindandi fyri limirnar.*"[36]

95. Um samtak av fyritøkum siga viðmerkingarnar til kappingarlógina at "*Hugtakið samtak av fyritøkum, fevnir um øll sløg av vinnugreinafeløgum og samskipaðum samstarvi í einum og hvørjum sniði millum fyritøkur.*"[37]

96. Tá hugt verður nærri eftir leiðregluni, sum vinnugreinafelagið, Samskifti, hevði viðtikið, er talan um, at kappingarneytar umvegis vinnugreinafelagið hava avtalað at ikki veita kreativt arbeiði ella tilboðsarbeiði uttan hóskandi samsýning. Feløgini hava tí ikki gjørt eina avtalu við hvønn annan, men bundið seg til at halda viðtøkuna av leiðregluni hjá vinnugreinafelagnum, Samskifti, sum fyritøkurnar eru limir í.

---

[33] LM-098/2022, s. 14
[34] LM-098/2022, s. 34
[35] LM-098/2022, s. 33
[36] LM-098/2022, s. 34
[37] LM-098/2022, s. 34

97. Talan er tí um eina viðtøku sum er fevnt av forboðnum í § 6, stk. 1, í kappingarlógini, um kappingaravlagandi avtalur, sbrt. § 6, stk. 3, í kappingarlógini.

### 4.3.3. Til endamál og /ella til fylgju

98. Ein avtala, viðtøka ella samskipan skal beinleiðis ella óbeinleiðis hava til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina fyri at verða fevnd av § 6, stk. 1, í kappingarlógini.

99. Viðvíkjandi um ein avtala hevur sum endamál ella sum fylgju at avmarka kappingina, siga viðmerkingarnar til kappingarlógina, at "*Forboðið rakar bæði avtalur, sum hava til endamáls at avlaga kappingina, sjálvt um tær ikki hava hesa avleiðing, og avtalur, sum ikki hava til endamáls at avmarka kappingina, men har avleiðingin av avtaluni er, at kappingin verður avmarkað. [...] Til tess at meta um, hvørt ein avtala hevur til endamáls at avlaga kappingina, er neyðugt at kanna innihald, ætlan og rættarliga- og vinnuliga samanhangin avtalan er partur av. [...] Ein avtala hevur sum fylgju at avmarka kappingina, tá hon hevur eina munandi avmarkandi ávirkan á ein av kappingarparametrunum á marknaðinum, so sum; prís, framleiðslu, góðsku, úrval og nýskapan. Tá metast skal um fylgjuna, skal samanbering gerast millum støðuna, har avtalan hevur virknað, og í tí føri har hon ikki er galdandi.*"[38]

100. Tá metast skal um, hvørt viðtøkan hjá vinnugreinafelagnum Samskifti hevði til endamáls ella sum fylgju at avmarka kappingina, er talan um tvær ymiskar treytir, sum ikki kunnu samantvinnaðast. Í fyrstu atløgu verður tí kannað, um viðtøkan beinleiðis ella óbeinleiðis hevði til endamáls at avmarka kappingina.

101. Tá hugt verður eftir hugtakinum "til endamáls at avmarka kappingina", so siga viðmerkingarnar til kappingarlógina, at tað er neyðugt at hyggja eftir innihaldinum, ætlanini, rættarligu og vinnuliga samanhanginum av avtaluni. Í donsku dómsvenjuni hevur Hægstirættur staðfest í UfR 2020.524H, at "*der for at anse et forhold for i sig selv at have konkurrencebegrænsning til formål skal være fornøden sikkerhed for, at tiltaget efter sin karakter i den givne markedsmæssige sammenhæng objektivt bedømt rummer et sådant potentiale af konkurrenceskadelige virkninger, at det ikke er fornødent at påvise faktisk indtrådte skadevirkninger.*"

102. Metingin, um avtalan hevur til endamáls at avmarka kappingina, skal tí gerast i) eftir sínum eginleika at avmarka ii) í tí marknaðar samanhangi, avtalan er gjørd í, og iii) um avtalan hevur møguleika at skaða kappingina á einum tílíkum stigi, at tað ikki er neyðugt at vísa á faktiskar avleiðingar.

103. Í ES-dómsvenjuni skal hendan metingin gerast við støðið í i) innihaldi í avtaluni, ii) endamálið við avtaluni og iii) tann búskaparliga og løgfrøðiliga samanhangin í avtaluni.[39]

104. Kappingareftirlitið hevur valt at nýta leistin frá ES-dómsvenjuni, tá úrslitið av metingini er tað sama.

---

[38] LM-098/2022, s. 32

[39] Sí millum annað C-172/14, *ING Pensii mod Consiliul Concurenţei*, reglubrot 33, C-67/13 P, *Groupement des cartes bancaires mod Kommissionen*, reglubrot 53, C-8/08, *T-Mobile Netherlands BV m.fl. mod Raad van bestuur van de Nederlandse Mededingingsautoriteit*, reglubrot 27, C-8/08, *T-Mobile Netherlands BV m.fl. mod Raad van bestuur van de Nederlandse Mededingingsautoriteit*, reglubrot 43 og C-501/06 P, C-513/06 P, C-515/06 P og C-519/06 P, *GlaxoSmithKline m.fl. mod Kommissionen*, reglubrot 58.

105. Metingin skal gerast partleys, men tað avmarkar ikki kappingarmyndugleikar at taka persónligu sjónarmiðini hjá pørtunum við í metingina, sbrt. ES-dóminum *Groupement des Cartes Bancaires,* reglubrot 54.[40]

106. Hvørt avtalan merkist av brúkarum, er ikki ein treyt fyri, um avtalan kann metast at hava til endamáls at avmarka kappingina, sbrt. ES-dóminum, *GlaxoSmithKline m.fl.,* reglubrot 63.[41] Í *GlaxoSmithKline m.fl.* vísti ES-dómstólurin á, at ásetingini í EF art. 81, svarandi til § 6, stk. 1, í kappingarlógini, ikki einans hevur sum endamál at verja kappingina ella brúkarans áhugamál, men eisini at verja bygnaðin á marknaðinum og kappinga sum heild.[42]

### 4.3.3.1 Innihaldi í avtaluni

107. Vantrættar prísavtalur (ein avtala millum kappingarneytar) hava í dómsvenjuni og í búskaparligum ástøðum eitt endamál at avmarka kappingina, tí hetta eru brot sum í sær sjálvum eru skaðiligt fyri kappingina. Hetta er millum annað grundað á, at luttakarar í einari vantrættari prísavtalu sannlíkt kunnu spáa um, hvønn príspolitikk kappingarneytarnir fara at hava.[43]

108. ES-dómstólurin staðfesti eisini í ES-dóminum *Groupement des Cartes Bancaires*, at atferð, sum er úrslit av einari vantrættari prísavtalu, hevur sum endamál at avmarka kappingina, tí royndir vísa, at tað viðførir eina niðurgongd í framleiðsluni og príshækkingar, sum skaðar brúkarar.[44]

109. Prísur er samstundis eitt av mest umráðandi amboðunum í kapping millum fyritøkur. ES-rætturin hevur í ES-dóminum *FNESA* staðfest, at ein ásetan av prísi er ein týðilig avmarking av kappingini.[45]

110. Í ES-dóminum BNIC staðfesti ES-dómstólurin, at ein avtala um ein minsta prís hevur sum endamál at reingja kappingina.[46]

111. Samstundis sum talan er um eina vantrætta prísavtalu, er innihaldi í leiðregluni orðað soleiðis, at ein óbeinleiðis hóttan um boykott liggur í leiðregluni. Myndugleikar og stovnar, sum ikki fylgja leiðregluni, kunnu tí verða útsett fyri, at fyritøkurnar ikki lata nakað tilboð í útbjóðingini hjá tí myndugleika ella stovni, sum ikki fylgir leiðregluni.

112. Tað er við hesum sannlíkt, at innihaldið í leiðregluni hevur verið við til at avmarka kappingina, soleiðis at viðtøkan fevndi um eina vantrætta prísavtalu og eina hóttan um boykott av teimum myndugleikum og stovnum, sum ikki fylgdu leiðregluni.

### 4.3.3.2 Endamálið við avtaluni

113. Sum víst á í pkt. **Error! Reference source not found.**, 34 og 35, hevur leiðreglan havt virknað bæði áðrenn og eftir viðtøkuna av leiðregluni. Ítøkiliga kann vísast á útboðið hjá Tórshavnar kommunu av nýggjari sniðhondbók. Her hevði Tórshavnar kommuna bjóðað út nýggja sniðhondbók til fýra samskiftisfyritøkur. Felagsskrivið til Tórshavnar kommunu við uppskoti um

---

40 C-67/13p, *Groupement des Cartes Bancaires mod Komissionen*, reglubrot 54.
41 C-501/06p, *GlaxoSmithKline m.fl. mod Komissionen,* reglubrot 63.
42 C-501/06p, *GlaxoSmithKline m.fl. mod Komissionen,* reglubrot 63
43 ES-dómur 8/72, *Vereeniging van Cementhandelaren mod Kommissionen*, reglubrot 21.
44 C-67/13p, *Groupement des Cartes Bancaires mod Komissionen*, reglubrot 51
45 T-217/03, FNCBV m.fl. mod Kommissionen, og T-245/03, FNSEA, reglubrot 83
46 ES-dómur 123/83, BNIC mod Guy Clair, reglubrot 22.

50.000 kr. til hvønn luttakara ella tilvísing til líknandi arbeiðir, er at meta sum ein vantrøtt prísavtala millum tær samskiftisfyritøkur, sum luttøku í felagsskrivinum.

114. Viðtøkan av leiðregluni varð viðtikin ein mánað eftir at Tórshavnar kommuna boðaði fyritøkunum frá, at Tórshavnar kommuna trekti útboðið aftur. Tórshavnar kommuna hevur ikki bjóða sniðhondbókina út av nýggjum.

115. Eisini hevur vinnugreinafelagið, Samskifti, vent sær til Keyp Landsins, sum umsitur og rekur almenna útboðsportalin. Í einum skrivi til Keyp Landsins, vísir felagið til viðtøkuna um ikki at veita kreativt- ella ráðgevingararbeiði uttan hóskandi samsýning.[47]

116. Í hesum at ikki veita kreativt- ella ráðgevingararbeiði uttan hóskandi samsýning liggur eisini, at limafeløgini, sum hava ein marknaðarpart omanfyri 90%, ikki fara at bjóða upp á útboð, um leiðreglan ikki verður fylgd.

117. Við einari vantrættari prísavtalu og einari óbeinleiðis hóttan um boykott er talan um, at fyritøkurnar minka um tann fíggjarliga váðan, fyritøkurnar hava við at luttaka í tilboðsarbeiði, soleiðis at limafeløgini ongan váða hava.

118. Endamálið við avtaluni er sannlíkt at minka um tann fíggjarliga váðan, sum fyritøkurnar hava í sínum útboðs- og tilboðsarbeiði.

#### 4.3.3.3 Tann búskaparliga og løgfrøðiligi samanhangurin í avtaluni

119. Sambært hoyringsskrivinum frá vinnugreinafelagnum Samskifti, var viðtøkan av leiðregluni grundað á "*at styrkja kappingina við at fleiri limir við henni høvdu møguleika at vera við, og at felagið gevur verið av tí fatan, at aðalreglan var óskaðilig*".[48]

120. Hóast vinnugreinafelagið, Samskifti, í skrivinum hevði víst á, at tað var fyri at styrkja kappingina, hevur táverandi forfólk, Niels Uni Dam, sagt frá, at leiðreglan tryggjar, at fyritøkurnar spilla nógv minni orku. Leiðreglan hevur tó ikki verið óskaðilig, tí fyritøkurnar bera færri fíggjarligar váðar, sum ger, at fyritøkurnar í størri mun kunnu áseta egnar treytir fyri luttøku, útboðsarbeiði og tilboðsarbeiði. Hetta ger, at fyritøkurnar samskipa útboðið á veitarasíðuni, sum er í stríð við meginregluna um, at fyritøkurnar skulu virka sjálvstøðugt á marknaðinum.

121. Harumframt hevur avtalan eitt fjalt endamál sum boykott av útbjóðarum og øðrum, sum ikki fylgja leiðregluni. Hetta er, tí at limafeløgini í Samskifti standa saman um ikki at veita kreativt arbeiði ella ráðgeving í útboðs- og tilboðsarbeiði. Við høgari miðsavning og einum samlaðum marknaðparti omanfyri 90% kunnu limafeløgini ávirka marknaðin á tílíkan hátt, at eingin bjóðar upp á útboðið, um leiðreglan ikki verður fylgd. Tí hevur avtalan mest sannlíkt eitt endamál um at boykotta útbjóðarar og onnur, sum ikki fylgja leiðregluni.

122. Av tí at leiðreglan varð viðtikin á aðalfundinum, er leiðreglan samstundis bindandi fyri limafeløgini og kann hetta fáa avleiðingar fyri teirra limaskap í vinnugreinafelagnum Samskifti, um limafelagið ikki heldur leiðregluna.

---

[47] Máls.nr. 24/00453-3: Umbøn um upplýsingar.
[48] Máls.nr. 24/00453-25: Svar til Kappingareftirlitið.

123. Tann búskaparligi og løgfrøðiligi samanhangurin í avtaluni er mest sannlíkt, at samskipa útboðið av samskiftistænastum og samskiftisráðgeving á veitarasíðuni við tí endamálið at lækka um tann fíggjarliga váðan, sum er í útboðs- og tilboðsarbeiði. Sannlíkt er eisini, at leiðreglan hevur eina óbeinleiðis hóttan við sær, sum er, at myndugleikar og stovnar verða boykottað, um leiðreglan ikki verður fylgd. Hendan hóttan er ein verulig hóttan, tí limafeløgini í vinnugreinafelagnum, Samskifti, hava ein samlaðan marknaðarpart á oman fyri 90% av marknaðinum.

#### 4.3.3.4 Ávegis niðurstøða um avtalan hevur til endamál og /ella til fylgju

124. Vísandi til omanfyristandandi metir Kappingareftirlitið tað tí vera sannlíkt, at talan er um eina viðtøku av einari vantrættari prísavtalu, við einari óbeinleiðis hóttan um boykott við tí endamálið at minka um tann fíggjarliga váðan, sum limafeløgini í vinnugreinafelagnum, Samskifti, hava í einum útboðs- og tilboðsarbeiði.

#### 4.3.4. Kappingaravlaging, sum merkist

125. Tá Kappingareftirlitið hevur staðfest, at viðtøkan hevur sum endamál at avmarka kappingina, er tað staðfest í ES- og donsku dómsvenjuni, at tað ikki er neyðugt at gera eina meting av, um kappingaravlagingin merkist, tí tað er sannlíkt, at avtalan í sjálvum sær er ein kappingaravlaging, sum merkist.

126. Hetta var staðfest í ES-dóminum C-226/11, *Expedia*, har dómstólurin segði "*Det må således fastslås, at en aftale, der kan påvirke handelen mellem medlemsstater, og som har et konkurrencebegrænsende formål, efter sin art og uanset aftalens faktiske følger udgør en mærkbar begrænsning af konkurrence*".[49]

127. Í avgerðini hjá danska kappingarráðnum, avgerð tann 18.12.2013, *Ejendomsmæglerkæden BoligOne's kædekoncept,* segði danska kappingarráðið, at viðtøkan var ein avtala, sum hevði eitt kappingaravlagandi endamál, og sum eftir sínari heild var ein kappingaravlaging, sum merktist.[50]

128. Í Konkurrenceankenævnets avgerð frá 23.06.2021, *Axel Kaufmann Aps og Hugo Boss Nordic Aps mod Konkurrencerådet*, segði Konkurrenceankenævnet soleiðis um metingina, um kappingaravlagingin merkist: " *EU-Domstolens dom af 13. december 2012 i sag C-226/11, Expedia, at når en aftale eller en samordnet praksis har et konkurrencebegrænsende formål, vil aftalen eller vedtagelsen efter sin art og uanset dens faktiske følger udgøre en mærkbar begrænsning af konkurrencen.[...] Vi finder på denne baggrund, at Konkurrencerådet i denne sag har oplyst sagen fyldestgørende og foretaget en vurdering, som er tilstrækkelig for at fastslå informationsudvekslingens konkurrencebegrænsende formål, og at Konkurrencerådet herefter ikke har været forpligtet til at foretage en nærmere undersøgelse af konkurrencebegrænsningens mærkbarhed*".[51]

129. Kappingareftirlitið hevur víst á, at viðtøkan mest sannlíkt hevur sum endamál at avmarka kappingina og víst á, at viðtøkan hevur havt virknað bæði áðrenn og aftan á viðtøkuna av leiðregluni. Her skal serliga vísast á útboðið hjá Tórshavnar kommunu av sniðhondbókini, sbrt. pkt. 32 og 33, og frágreiðingini hjá Niels Una Dam, táverandi forfólki í Samskifti, um týdningin av leiðregluni í *Gerðabók, Nevndarfundur fríggjadag, tann 18.02.2022.*, sbrt. pkt. 34.

[49] C-226/11, *Expedia* Inc mod Autorié de la concurrence m.fl., reglubrot 37
[50] Konkurrencerådet, avgerð frá 18.12.2013, Ejendomsmæglerkæden BoligOne's kædekoncept, reglubrot. 166
[51] Konkurrenceankenævnet, avgerð frá 23.06.2021, *Axel Kaufmann Aps og Hugo Boss Nordic Aps mod Konkurrencerådet*, s. 42

130. Kappingareftirlitið fer tí ikki at greiða nærri frá, um hvørt kappingaravlagingin merkist, tí leiðreglan mest sannlíkt hevur havt sum endamál at avmarka kappingina.

### 4.3.5. Ávegis niðurstøða um brot á § 6, stk. 1, í kappingarlógini

131. Vísandi til viðgerðina omanfyri, er niðurstøðan hjá Kappingareftirlitinum at,

- vinnugreinafelagið Samskifti lýkur treytina um kravið fyritøka eftir § 6, stk. 1,
- at talan er um eina viðtøku millum samtøku av fyritøkum (vinnugreinafelag), sbrt. § 6, stk. 3,
- at viðtøkan sannlíkt hevur havt sum endamál at avmarka kappingina fyri samskiftistænastur og samskiftisráðgeving, og
- viðtøkan sannlíkt er ein kappingaravlaging sum merkist í stríði við § 6, stk. 1, í kappingarlógini.

### 4.4. Frítøka

132. Ein avtala í stríði við forboðið í § 6, stk. 1, í kappingarlógini kann verða fevnd av undantøkunum til forboðið í kappingarlógini.

133. Undantøkini til forboðið móti kappingaravlagandi avtalum eru at finna í §§ 7-10, í kappingarlógini. Undantakið í § 9 í kappingarlógini er einans viðkomandi, um fyritøkan frammanundan eitt kappingarmál biður um eina váttan uppá, at avtalan ikki er kappingaravlagandi. Tað er ikki gjørt í hesum føri. Undantakið í § 10 er ikki viðkomandi, tí landsstýrismaðurin hevur ikki ásett nærri reglur um frítøku, sum er neyðugt sambært ásetingini.

134. Kappingareftirlitið skal tí meta um, hvørt viðtikna leiðreglan kundi havt verið undantikin forboðnum í § 6, stk. 1, í kappingarlógini eftir §§ 7 og 8 í kappingarlógini.

### 4.4.1 §7 í kappingarlógini

135. Sambært § 7 kappingarlógini er tað møguligt, at ein avtala ikki er fevnd av ásetingini í § 6, tá talan er um:

1) *samlaðu marknaðarpartar hjá luttakandi fyritøkunum ikki eru hægri enn 10 prosent á nøkrum av viðkomandi marknaðum, sum avtalan og annað viðvíkur, tá ið henda er gjørd millum fyritøkur, sum eru ella møguliga kunnu verða kappingarneytar á einum av hesum marknaðum (avtalur millum kappingarneytar), ella*

2) *marknaðarpartarnir hjá luttakandi fyritøkum einsæris ikki eru hægri enn 15 prosent á nøkrum av viðkomandi marknaðum, sum avtalan og annað viðvíkur, tá ið henda er gjørd millum fyritøkur, sum ikki eru ella verða kappingarneytar á einum av hesum marknaðum (avtalur millum ikki kappingarneytar).*

136. Undantøkini eru tí antin, at 1) fyritøkurnar hava ein marknaðarpart sum ikki er hægri enn 10% ella 2) fyritøkurnar einsæris hava ein marknaðarpart, sum er undir 15%. Undantøkini eru harafturímóti ikki galdandi, um i) avtalan hevur sum endamál at avmarka kappingina, sbrt. § 7, stk. 3, ella ii) um avtalan og annað saman við líknandi avtalum og øðrum avmarkar kappingina, sbrt. § 7, stk. 4.

137. Í tann mun ivi er um, hvussu avtalan skal flokkast eftir nr. 1 ella 2, verða marknaðarpartarnir í stk. 1, nr. 1, galdandi, sbr. § 7, stk. 2.

138. Av tí at Kappingareftirlitið hevur flokkað avtaluna sum sannlíkt at hava til endamáls at avmarka kappingina, kann viðtøkan ikki frítakast frá forboðnum í § 6, stk. 1, í kappingarlógini, sbrt. § 7, stk. 3, í kappingarlógini.

### 4.4.2. §8 í kappingarlógini

139. Sambært §8 í kappingarlógini kann ein avtala vera frítikin forboðnum í § 6, stk. 1, um avtalan:

1) *er við til at styrkja fulldygga framleiðslu ella útbreiðslu av vørum ella tænastuveitingum ella fremur tøkniliga ella búskaparliga menning,*

2) *tryggjar brúkarum rímiligan part av tí fyrimuni, sum kappingaravmarkingin hevur við sær,*

3) *ikki áleggur fyritøkum avmarkingar, sum eru óneyðugar fyri at náa hesum endamálum, og*

4) *ikki gevur fyritøkum møguleika at útihýsa kapping innan ein týðandi part av ávísum vørum ella tænastuveitingum.*

140. Talan er um fýra treytir, sum allar skulu vera loknar, fyri at talan kann vera um frítøku eftir § 8 í kappingarlógini. Aðalreglan fyri frítøku eftir § 8 í kappingarlógini er, at avtalan fremur ein effektivitet, sum kemur brúkarum til góðar.[52]

141. Tað er ikki álagt fyritøkum og øðrum eina skyldu at fráboða avtalur, sum eru fevndar av § 6, stk. 1. Treytirnar fyri frítøku skulu tó undir øllum umstøður vera loknar og frítøkan kann í fyrsta lagi vera, tá hesar treytir eru loknar, sbrt. § 8, í kappingarlógini. Í hesum verður eisini álagt fyritøkunum og øðrum at hava neyðuga dokumentatión, um fyritøkurnar ella onnur ynskja at tryggja, at avtalan er frítikin sambært § 8 í kappingarlógini.

142. Í viðmerkingunum frá vinnugreinafelagnum, Samskifti, vísur felagið á, at endamálið var at vísa á týdningin av, at kreativt arbeiði eigur at verða samsýnt.[53] Hetta er grundað á, at ein útbjóðari fær og hevur fingið tilboð ókeypis.[54]

143. Tá Kappingareftirlitið metir, at avtalan sannlíkt er ein vantrøtt prísavtala við hóttan um boykott, kann avtalan ikki lúka treytirnar í § 8, stk. 1, í kappingarlógini. Avtalan í sjálvum sær hevði tí sannlíkt avmarkað kappingina í ein tílíkan mun, at treytirnar 3 og 4 ikki høvdu verið loknar. Hetta er tí at avtalan áleggur limafeløgunum óneyðugar avmarkingar og kann avtalan vera við til at útihýsa kappingina. Av tí at treytirnar 3 og 4 sannlíkt ikki eru loknar, er ikki neyðugt hjá Kappingareftirlitinum at taka støðu til treytirnar 1 og 2.

## 5. Samlað niðurstøða

144. Vísandi til omanfyristandandi er metingin hjá Kappingareftirlitinum, at

---

[52] ES-vegleiðingin Guidelines on the application of Articlre 81(3) of the Treaty (2004/C 101/08), reglubrot. 107-115.
[53] Máls.nr. 24/00453-25, Viðmerkingar frá felagnum Samskifti.
[54] Máls.nr. 24/00453-25, Viðmerkingar frá felagnum Samskifti.

- viðkomandi marknaður skilmarkast til samskiftistænastur og samskiftisráðgeving í Føroyum. Kappingareftirlitið hevur ikki gjørt eina endaliga skilmarking av viðkomandi marknaði,
- vinnugreinafelagið, Samskifti, lýkur treytirnar viðvíkjandi kravinum um fyritøka í § 6, stk. 1, sbrt. § 6, stk. 3,
- vinnugreinafelagið, Samskifti, hevði viðtikið eina leiðreglu um hóskandi samsýning í útboðs- og tilboðsarbeiði, sum sannlíkt er at meta sum ein vatnrætt prísavtala við kravi um ein minsta prís,
- atferðin sannlíkt hevði til endamáls at avmarka kappingina um samskiftistænastur og samskiftisráðgeving,
- tað er sannlíkt, at atferðin var ein kappingaravlaging, sum merktist í stríði við § 6, stk. 1, sbrt. stk. 2, nr. ,1 og stk. 3,
- viðtøkan ikki er fevnd av undantøkunum til forboðið í § 6, stk. 1, í kappingarlógini um kappingaravlagandi avtalur, sbrt. §§ 7-10, í kappingarlógini,
- tað er neyðugt at geva boð, sbrt. § 26, stk. 1, í kappingarlógini fyri at tryggja, at vinnugreinafelagið, Samskifti, ikki samskipar atferðina ella á annan hátt virkar í stríð við kappingarlógina.

# 6. Tilsøgnin

Samskifti

Tórshavn 11. mai 2026

**Tilsøgn**

Vinnugreinafelagið Samskifti veitir hervið Kappingareftirlitinum eina tilsøgn sbrt. § 27, stk. 1, sbrt. § 6, stk. 4, í kappingarlógini. Tilsøgnin verður veitt sum loysn uppá tey kappingarligu ivamálini, ið hava verið í máls.nr. 24/00543, um møguligt brot á kappingarlógina við at samskipa atferð.

Vinnugreinafelagið Samskifti vil ikki hava eina framferð, sum møguliga stríðir móti lóggávuni, og felagið hevur tí av sínum eintingum strikað leiðrgegluna og hevur kunnað sínar limir um tað møguliga kappingarmálið. Kappingareftirlitið varð kunnað um hetta tann 3. mars 2025. Leiðreglan er tí ikki galdandi longur.

Vinnugreinafelagið skal vísa á, at einhvør sum virkar í mun til kappingarlógina skal halda seg til lógina. Vinnugreinafelagið Samskifti er ikki eitt áhugafelag sum heldur eftirlit við arbeiðnum hjá einstøkum fyritøkum, men krav er, allir nevndarfundir og aðalfundir í vinnugreinafelagnum skulu uttan undantak verða avgreiddir innan ásetingarnar í kappingarlógini.

Tilsøgnin sum felagið Samskifti gevur Kappingareftirlitinum er fylgjandi:

- Vinnugreinafelagið Samskifti hevur kunnað limirnar um tað møguliga brotið á kappingarlógina,
- Leiðreglan er strikað og verður verðandi strikað,
- Vinnugreinafelagið Samskifti bindur seg til ikki at venda sær til ella at samskipa atferðina mótvegis triðjamanni, serliga viðvíkjandi prísum og treytum hjá limafeløgunum,
- Vinnugreinafelagið Samskifti ger eina vegleiðing um regluvarni (compliance), sum skal nýtast í nevndararbeiðinum hjá felagnum,
- Vinnugreinafelagið Samskifti sendir vegleiðingina um regluvarni til Kappingareftirlitið til góðkenningar innan ársendan,
- at nýggir limir og verandi limir fáa eitt eintak av tilsøgnini og vegleiðingini um regluvarni, og
- at vegleiðingin um regluvarni verður dagført og tøk hjá nevndini og limunum til eina og hvørja tíð.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Samskifti

Vegleiðingin setir treytir til forboðið at umrøða viðurskifti, ið skapa ella kunnu skapa kappingaravlagandi virksemi vísandi til kappingarlógina. Skotið verður upp, at vegleiðingin er soljóðandi:

*"Einhvør sum virkar í mun til kappingarlógina hevur ábyrgd av at tryggja, at virkað verður innan ásetingarnar í kappingarlógini.*

*Nevndin í vinnugreinafelagnum Samskifti skal vísa serliga varsemi við umrøðu av prísum, viðskiftatreytum, samstørvum og annað sum er rætta mótvegis triðjamanni.*
*Í teimum førum nevndin ætlar at viðtaka leiðreglur ella annað sum er bindandi fyri limirnar og viðvíkir kapping, skal møguleikin at biðja Kappingareftirlitið eina váttan eftir § 9, í kappingarlógina, umrøðast*

*Somuleiðis skal felagið Samskifti tryggja, at nevndarfundir og aðalfundir uttan undantak verða avgreiddir innan fyri ásetingarnar í kappingarlógini. Fundir felagsins skulu ikki hava í sær umrøðu av viðurskiftum, ið skapar ella kann skapa kappingaravlagandi virksemi, ið er brot á kappingarlógina. Um so er at fundarluttakari tekur upp viðurskifti, sum eru ella kunnu verða í stríð við ásetingarnar í kappingarlógini, skal fundarleiðslan taka stig til at steðga viðgerðini, og um neyðugt slíta fundin."*

Dagføringin av vegleiðingini um regluvarni verður gjørd seinast 3 hvørt ár. Við dagføringum meinast at vinnugreinafelagið Samskifti tekur støðu til, um vegleiðingin er í tráð við galdandi lóggávu ella um vegleiðingin skal dagførast. Um neyðugt er at dagføra vegleiðingina, verður vegleiðingin send Kappingareftirlitinum til kunningar.

Við hesari tilsøgnini meta vit í vinnugreinafelagnum Samskifti, at vit á nøktandi hátt forða fyri at samtykkja møguligar kappingaravlagandi leiðreglur og kunnu áhaldandi virka sum eitt vinnugreinafelagið í tráð við kappingarlógina.

Gildiskoma:
Tilsøgnin fær virknað frá tí at Kappingarráðið hevur tikið avgerð um at góðtaka veittu tilsøgnina og staðfest at tilsøgnin gongur ivanum hjá Kappingareftirlitinum á møti um møguligt brot á § 6, stk. 1, sbrt. § 6, stk. 3, í kappingarlógina. Tilsøgnin er ikki tíðaravmarkað.

**Vegna SAMSKIFTI**

Michael Koba, form.

Rókur Jákupsson Jakobsen, næstform.

Bára Gunnarsdóttir. ráðgevi

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo